# Nógvir føroyingar fylgja oljutilgongdini

**Jan Müller**

29.03.2014 - 13:10

Oljan.fo

Gongdin innan olju- og frálandavinnuna úti í heimi og eisini í Føroyum hevur sum vera man stóran áhuga hjá mongum fólki. Í stóru oljulondunum Norra og Bretlandi, har henda vinna skjótt hevur fimti ár á baki, gera fjølmiðlar nógv burtur úr hesum vinnum, og ikki er tað so løgið heldur, tí hesar vinnur skapa hundraðtúsundtals arbeiðspláss og stórar inntøkur til samfeløgini har.

Tó at olju- og frálandavinnurnar enn eru ungar her á klettunum, so tykist áhugin fyri hesum økinum at vera støðugt vaksandi. Her eru tað fyrst og fremst boringarnar á landgrunninum, sum gera sítt til at fylgt verður við gongdini. Men eisini menningin av okkara stolta frálandaflota og mongu føroyingarnir, sum vinna sær til lívsins uppihald í olju- og frálandavinnunum í okkara grannalondum, hava økt um áhugan fyri at fylgja við tilgongdini.

Hetta sæst so eisini aftur á tí føroyska oljuportalinum oljan.fo, sum er partur av portal.fo universinum.

Hetta gav á bíta í farnu viku, tá www.oljan.fo setti met, síðani fyrstu greinarnar komu út á alnetið fyri góðum hálvum triðja ári síðani. Vevmátingarlistin hjá Gallup vísti í farnu viku 15.155 brúkarar á oljan.fo og var oljuportalurin á einum fjórða plássi av samlaðu netsíðunum ta vikuna.

Føroyski oljuportalurin umrøður serstakliga olju- og frálandavinnurnar í okkara parti av heiminum. Her ikki minst gongdina hjá okkara næstu grannum, Norra og Bretlandi, har hesar vinnur hava alstóran týdning fyri samfelagsbúskapin. Nógvir føroyingar arbeiða eisini í hesum vinnum í báðum londunum umframt, at eitt stórt tal her serstakliga føroysk sjófólk eru at finna á øllum heimsins høvum.

Men tað, sum í hesum tíðun kanska dregur mest, eru tíðindi, sum hava samband við komandi tvær boringarnar á landgrunninum. Og her kundi oljan.fo í vikuni siga frá, at føroyskar fyritøkur koma at standa fyri teimum flestu av veitingunum til tær risastóru verkætlaninar, sum Statoil stendur á odda fyri.

Oljan.fo fer at hava eitt sera vakið eygað við gongdini á landgrunninum og fara vit komandi mánaðirnar vónandi at hava reportasjur frá bæði boripalli, veitingarskipum, flogfelag, oljuhavnini í Runavík og eisini øðrum.

Oljan.fo roynir eisini at umrøða orkumál sum heild, umhvørvisspurningar, sum hava tilknýti til troytanina av tilfeinginum og somuleiðis útviklingin í tí arktiska økinum, sum Føroyar eru ein partur av.

Føroyski oljuportalurin sær eisini fegin, at lesarar, her ikki minst føroyingar, sum arbeiða í hesum vinnum, siga frá sínum upplivingum og søgum. Skrivið ein teldupost tiljan@foib.fo.

Tað er felagið FOÍB, Føroya Oljuídnaðarbólkur, sum umsitur oljan.fo. Í felagnum eru øll oljufeløgini, sum hava leitiloyvi í Føroyum. Hesi eru í dag: Statoil, Dong, ExxonMobil, OMV og Atlantic Petroleum.



